# Føroyar fingu frálíkt úrslit


*John Arne Nilssen er føroyingurin vi› hægsat ratingtalinum. Undir OL var um reppi›, at hann ogna›i sær ein IM-norm*
*Føroyar fingu frálíkt úrslit*

**Kravi› hjá føroyingum undan seinasta umfari var› at vinna minst 3-1 fyri at náa 50%. Teir møttu S‡ria og megna›u eisini kravi›, og samanumtiki› eitt flott úrslit hjá okkara monnum í Istanbul. Russar vunnu enn einafer› talvolympiaduna, me›an danir fingu besta nor›urlendska úrsliti›**

TALVOLYMPIADA
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Máli› hjá føroyingum undan olympiaduni var at náa 50%, og hetta mál eydna›ist.

Ta› vísti seg gjøgnum alla kappingina, at føroyingar tóku stig frá teimum sterku og vunnu stórt ímóti teimum veiku. Í fjúrtanda seinasta umfari høvdu føroyingar eina heldur veikari talvtjó› yvir av sær, nevnliga S‡ria.

John Arni Nilssen gjørdi skjótt av vi› mótstø›umann sín, sum hev›i yvir 2400 í rating. S‡rin offra›i mann, men misti mann seinni og gavst. Eitt flott talv hjá John Arna sum er vi› í bla›num í dag.

John Rødgaard hev›i svarta fólki og í mi›spælinum bjó›a›i s‡rin Rødgaard javnleik, sum Rødgaard tók av. Heini Olsen vann á tri›ja bor›i, me›an Flóvin T. Næs leikti javnleik á fjór›a bor›i.

3-1 og endamáli› rokki›.

**Einstøku úrslitini**

| | |
|---|---|
| John Arni Nilssen | 6 / 12 |
| John Rødgaard | 7 / 12 |
| Heini Olsen | 5 / 10 |
| Flóvin T. Næs | 5 / 12 |
| Ólavur Simonsen | 4,5 / 8 |
| Ey›un Nolsøe | 5 / 2 |

Hesi einstøku úrslit geva tilsamans 28 stig av 56 møguligum, og toppskorarin bleiv John Rødgaard.

Fyrsta bor› hjá okkum, John Arni bardi seg manniliga upp á 50% eftir eina slaka byrjan. Hann møtti sjálvsagt sterkastu mótstø›una, men nógvir stórmeistarar máttu taka til takkar vi› javnleiki. John Arni vaks vi› uppgávuni, og telva›i sum ein stórmeistari og prógva›i eisini at hann saktans megnar uppgávuna á fysta bor›i. Hann fekk besta føroyska úrsliti›, og var› tætt vi› ein IM norm. John Arni ogna›i sær eisini eini 15-20 ratingstig og nærkast nú 2400. Rødgaard leg›i út sum eitt ódnarve›ur vi› at vinna í fyrsta umfari ímóti stórmeistara, og var sera tryggur í sínari telving alla kappingina. Ímóti endanum var hann møguliga ov tryggur, tók nógvar skjótar javnleikir, men kappingin er long og krevjandi og tí er ta› væl skiljandi at ein tekur sær av løttum av og á. Eins og John Arni, fekk Rødgaard eini 20 ratingstig inn á kontina.

Tri›ja bor›i› hjá okkum, Heini Olsen, hev›i eina kapping beint undir mi›al. Hann fekk ikki veruliga spæli› at hanga saman, men vann tó eitt gott talv í sí›sta umfari, sum vi›førdi at hann eins og li›i› fekk 50%. Heini misti umlei› 15 ratingstig.

Flóvin Tór Næs hev›i eina framúr gó›a kapping í OL í 98, men ikki eins gó›a í ár. Hann skifti vi› at tapa og vinna og vísti eisini vi› sínum bert tveimum javnleikum, at hann er ein kempari. Flóvin er kendur fyri at strí›ast til seinasta mann, og júst hesin eginleiki hevur oftani veri› til hansara fyrimum. Hann helt sítt ratingtal, og kann tí ikki vera heilt ónøgdir.

### Ólavur í turkiska sjónvarpi›

F‡ra mans telv í senn, men í tílíkari stórari kapping er ney›ugt vi› eykaleikarum, og hesir vór›u Ólavur Simonsen og Ey›un Nolsøe. Hesin seinni var tó bert at síggja á li›num um sjúka ráddi á li›i okkara, og telva›i tí bert tvey talv. Ey›un var fer›alei›ari og li›lei›ari á fer›ini.

Ólavur bleiv harafturímóti brúktir nógv. Átta talv telva›i hann, og klára›i seg væl. Hann telva›i ø›rvísi, ta› vil siga at hann ikki telva›i vilt og opi›, sum hann plagar, men heldur positionelt og trygt. Hetta loysti seg og fór hann eisini eini 20 ratingstig uppeftir listanum.

Ólavur var einasti føroyingur sum kom í turkiska sjónvarpi›. Hann hev›i lita› hári› hjá sær solei›is at ta› líktiskt føroyska flagginum, og hesum fekk hann heilt nógva umtalu av!

**Endaliga stø›an:**

| | | stig |
|---|---|---|
| 1. | Russland | 38 |
| 2. | T‡skland | 37 |
| 3. | Ungarn | 35,5 |
| 4. | Ukraina | 35,5 |
| 24. | Danmark | 32 |
| 43. | Svøriki | 30 |
| 46. | Finnland | 30 |
| 54. | Norra | 29,5 |
| 56. | Ísland | 29 |
| 68. | Føroyar | 28 |

Íalt luttóku 126 lond.

Danir høvdu besta úrslit av nor›anlondum, og vór›u teir eitt sindur hepnari lógu teir í topp tíggju.

Sum ta› sæst á endastø›uni vór›u Føroyar ikki langt aftanfyri grannalondum okkara. Okkara besta úrslit var í 1994 tá OL var í Moskva. Tá fingu vit 29,5 stig, men talv hevur ment seg nógv seinastu árini. Framkomnar teldur og telduforrit gera sítt, so spurningurin er, um ikki úrsliti› í ár er okkara besta.

Vit vór›u styrkismettir sum nummar 77, men enda›u loksins níggju pláss framanfyri seedingina. Vit enda›u framanfyri lond sum Wales, Meksiko, Su›urafrika og Burma, sum hev›i tríggir stórmeistarar á li›num.

Vinnarin av 3rd Tórshavn International, Alexander Grischuk0 telva›i vi› á vinnandi russiska li›num. Hann prógva›i sítt vir›i og fekk heili 7,5 stig av tíggju á fjór›a bor›i. Sjálvt um ta› er nærum ómøguligt so fekk Ruslan Ponomariov sum enda›i javnir vi› Grischuk í Havn, eitt betri úrslit á ø›rum bor›i hjá Ukraina. Hann fekk heili 8,5 stig av 11, og eina præstatiónsrating yvir 2800. Hetta má sigast at vera í heimsklassa.

### Heimliga li›kappingin

Li›kappingin heima í Føroyum byrjar sunnudagin 19. november.

Kappingin ver›ur merkt av, at størstu feløgini í landinum Havnar Telvingarfelag og Klaksvíkar Talvfelag, hava mist nakrir av vanligu fyrstudeildartelvarunum sínum. Í Havnini telva Flóvin Tór Næs og undirrita›i ikki vi› vegna bú›sta›arskifti til Danmarkar, men telva hinvegin vi› Talvfelagnum Føroyar í Keypmannahavn. Eisini Martin Poulsen er burturstaddur, hann er á talveftirskúla í Jútlandi.

Mest áhugaverda broytingin er í Klaksvíkar Talvfelag. Landsli›sleikarin Ólavur Simonsen hevur valt at telva vi› Runavíkar Talvfelag, sum í ár leika í 2. deild. Ólavur fær sams‡ning fyri at telva vi› talvfelagnum í Runavík.

### Talvi› hesa vikuna

John Arni Nilssen (2346) - Hakki,I (2453)
34th Chess Olympiad (men) Istanbul (14), 12.11.2000

1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Ric3 Bb4 Nimzoindisk byrjan 4.e3 c5 5.Bd3 Ric6 6.Rige2 d5 7.cxd5 exd5 8.a3 cxd4 9.exd4 Bxc3+ 10.bxc3 h6 11.0-0 0-0 12.f3 Re8 13.g4 John Arni ætlar at enda OL vi› álopi› og stíli! Ria5 14.Kh1 Ric4 15.Rg1 Rih7 16.Rif4 Rig5 17.Ff1 Fa5 18.Ra2 Rid6 19.h4 Rige4? Rie6 hev›i givi› svørtum nærum líkaspæl. Ofri› er ókorrekt, og ta› revsa›i John Arni 20.fxe4 dxe4 21.Be2 Fxc3 22.Fd1 Bd7 23.Bd2! Fxd4 24.Bb4! Rib5 25.Rd2 Ff2 26.Rxd7 og s‡rin gavst 1-0

## Topp 25 á n‡ggja listanum

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | John Arni Nilssen | HT | 2340 |
| 2 | John Rødgaard, IM | VT | 2310 |
| 3 | Heini Olsen | KTF | 2300 |
| 4 | Flóvin flór Næs | HT | 2235 |
| 5 | Torbjørn Thomsen | KT | 2220 |
| 6 | Ey›un Nolsøe | KTF | 2190 |
| 7 | Ólavur Simonsen | KTF | 2175 |
| - | Rógvi W. Rasmussen | HT | 2175 |
| 9 | Rani Nolsøe | KTF | 2170 |
| 10 | Bogi Ziska | SF | 2165 |
| 11 | Jens Chr. Hansen | TT | 2140 |
| 12 | Martin Poulsen | HT | 2130 |
| 13 | Jóan Hendrik Andreasen | HT | 2090 |
| 14 | Torben Ø. Johansen | HT | 2085 |
| 15 | Terji Petersen | KTF | 2080 |
| - | Heini Danielsen | HT | 2080 |
| 17 | Martin Brekká | TFS | 2070 |
| 18 | Torkil Nielsen | ST | 2055 |
| - | Steintór Rasmussen | KTF | 2055 |
| 20 | Finnbjørn Zachariasen | TFS | 2045 |
| 21 | Carl Eli N. Samuelsen | HT | 2035 |
| 22 | Haldur Suni Johansen | HT | 2030 |
| 23 | Herluf Hansen | HT | 2020 |
| 24 | Bernhard Thomsen | KT | 2015 |
| 25 | Wille Olsen | KTF | 2005 |



# Ta› var John

Fleiri føroyskir hyggjarar mundu fáa ein hvøkk, tá teir sunnudagin hugdu at sendingini, Onside, hjá TV3.

Me›an teir vístu eina samrø›u vi› AB-leikaran, Steven Lüstu, sást brádliga eitt kent andlit á venjingarvøllinum aftan fyri.

Flest øll vóru á einnum máli um, at talan var um John Petersen, og so var eisini.

Tá vit sunnukvøldi› skiftu or› vi› John um hetta, vátta›i hann smílandi, at so var, men samstundis seg›i hann, at hann als ikki er ávegis til danska felagi›.

– Upptøkan er gjørd, me›an eg fyri stuttum var og fer›a›ist. Jákup í Stórustovu hev›i í hesum sambandi spurt seg fyri, um ta› var gjørligt, at eg slapp at venja saman vi› AB, og hesum játta›u teir.

– Talan var sostatt ikki um nakra royndarvenjing, og ta› hev›i eg heldur ikki havt loyvi til, leggur John afturat.

Hann vísir á, at hann framvegis er sáttmálabundin at Leiftri, og um naka› felag skuldi veri› áhuga› í at keypa hann, skulu teir fyrst seta seg í samband vi› felagi›.

**jm**


*Mangir hyggjarar mundu fáa ein hvøkk, tá teir sunnudagin sóu John Petersen venja vi› danska superligufelagnum, AB*

## Stø›an, danska superligan

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brøndby | 16 | 9 | - | 3 | - | 4 | 42 | 20 | 22 | 30 |
| 2 | Lyngby | 13 | 9 | - | 1 | - | 3 | 27 | 28 | -1 | 28 |
| 3 | FCM | 16 | 7 | - | 6 | - | 3 | 26 | 20 | 6 | 27 |
| 4 | FCK | 16 | 7 | - | 5 | - | 4 | 24 | 14 | 10 | 26 |
| 5 | OB | 16 | 8 | - | 2 | - | 6 | 25 | 16 | 9 | 26 |
| 6 | Silkeborg | 16 | 6 | - | 8 | - | 2 | 22 | 21 | 1 | 26 |
| 7 | Viborg | 16 | 7 | - | 4 | - | 5 | 22 | 13 | 9 | 25 |
| 8 | AaB | 16 | 6 | - | 4 | - | 6 | 25 | 26 | -1 | 22 |
| 9 | AGF | 16 | 6 | - | 2 | - | 8 | 24 | 30 | -6 | 20 |
| 10 | AB | 16 | 3 | - | 6 | - | 7 | 21 | 25 | -4 | 15 |
| 11 | Herfølge | 16 | 3 | - | 5 | - | 8 | 20 | 33 | -13 | 14 |
| 12 | Haderslev | 16 | 0 | - | 4 | - | 12 | 14 | 46 | -32 | 4 |

Javnt í oddinum

# Toppurin av donsku superliguni broyttist ikki stórvegis um vikuskifti›

SUPERLIGA
*Jákup Mørk*

Tveir av teimum f‡ra føroysku landsli›sleikarunum vóru á vøllinum, tá tri› seinasta umfari› fyri vetrarste›gin var› leikt sunnudagin.

Sum nevnt a›ra sta›ni í bla›num, so gjørdi Todi Jónsson rættiliga um seg, tá FCK á heimavølli fekk anna› stigi› móti Silkeborg. FCK var á odda 1-0, men Silkeborg, sum enn ikki hevur tapt á útivølli, kom fram um 2-1, á›renn Todi vi› einum sonnum perlumáli bjarga›i ø›rum stiginum til FCK.

### OB upp og Johan úti

Hjá OB, har Johan Byrial Hansen spælir, gongst væl í løtuni, tó at teir vóru hepnir at fáa bæ›i stigini móti AB.

Johan kom ikki á vøllin, og hóast hann helst frøist um framgongdina hjá li›feløgunum, so man ta› kennast heldur hugstoytandi, at henda er komin, samstundis sum hann sjálvur tykist hava fingi› fast pláss á beinkinum hjá fjónbúgvunum.

Í AGF er Óli Johannesen nú heilt úti í kuldanum, og heldur ikki í botndystinum móti Herfølge var hann at síggja á vøllinum.

Jákup Mikkelsen vardi máli› hjá Herfølge, sum fekk eitt kærkomi› stig móti AGF, sum annars hevur vunni› seinastu tríggjar dystirnar.

Ta› var merkisvert, at Peter Degn, sum AGF hevur leiga› úr Everton, stó› fyri bá›um málunum í dystinum.

Fyrst var hann hægstur, og stúta›i bóltin fram vi› Jákupi Mikkelsen, og í seinna hálvleiki stúta›i hann eitt klokkureint sjálvmál í neti›.

Vi› eina stiginum nærka›ist Herfølge røttu sí›uni av ni›urflytingarstrikuni, men enn kunnu teir so langt ífrá kenna seg tryggar.

Komandi vikuskifti skal Herfølge á heimavølli royna seg móti sterku uppflytarunum úr FCM. OB fer á vitjan hjá botnli›num úr FCM, me›an FCK á útivølli skal royna seg móti AB.

